# Kjak



**Høgni Hoydal**
*form. í Tjóðveldi*



**Kári á Rógvi**
*form. í Sjálvstýrisflokkinum*

## Gølurnar mugu fáa politiskar og rættarligar avleiðingar!

Formenninir í Tjóðveldi og í Sjálvstýrisflokkinum hava í dag fundast um ta fyrisitingarligu kreppuna, Føroyar eru í. Tann ólukkuliga støðan sæst lýst í frágreiðingum umboðsmansins, serliga nýggjastu um politiska uppílegging í grannskoðaramálið, men eisini fleiri øðrum. Samstundis gerst alsamt meiri greitt, hvussu stór politiska gølan um miðnámsskúlan í Suðuroy er, eins og frættist um fleiri onnur mál.

Hóast óteljandi av hesum málum eru reist á tingi seinastu 7 árini, hevur gongdin higartil verið greið: Hvørja ferð tingfólk royna at kanna hesi mál – t.d. tá ið roynt var at fáa kanning av eftirlitsarbeiði løgmanna eftir stýrisskipanarlógini – verður málið køvt, og lok lagt omaná sannleikan. ABC-samgongan hevur higartil nýtt meiriluta sín at forða fyri djypri kanningum og avleiðingum.

Men seinastu málini mugu hava sannført tey flestu um, at hetta hevur elvt til støðugt størri óskil í fyrisitingini. Álitið máast undan politisku skipanini og rættartrygdini burtur, um ikki stór og prinsippiel stig verða tikin beinanvegin.

Nú landsstýrið ætlar at kanna seg sjálvt, fer máast álitið enn meira undan fyrisitingini.

Vit fara tí at skjóta upp fyri tingbólkum okkara eins og øðrum tingfólkum:

At frágreiðingin frá Umboðsmanninum um politiska uppílegging í grannskoðaramálið verður nýtt sum grundarlag fyri at reisa ákæru eftir §5 í lóg um ábyrgd landsstýrismanna mótvegis teimum landsstýrismonnum, ið sambært frágreiðingini hava framt greitt brot á sínar skyldur og ábyrgdir.

At Løgtingið setur kanningarstjóra at kanna og lýsa alt málið um skúlabyggingina í Hovi við denti á politisku og fyritsingarligu avgerðirnar.

Fer samgongan at forða fyri hesum, fara vit at leggja uppskot fyri tingið um at seta eina seta §19-nevnd sambært stýrissskipanarlógini at kanna hesi mál.

Løgtingið skal so fáa høvi at taka støðu næstu dagarnar.



**Johan Petersen**

## Republic service?

*Eygsjón-sendingarnar í Kringvarpinum eru mangan áhugaverdar og upplýsandi, men í vikuni, sum fór, var dømi um, hvussu villeiðandi sendingin kann gerast, um journalisturin bert er mikrofonhaldari*

Sendingin Eygsjón skal eftir tí, Kringvarpið sigur, vera ein sending, sum fer aftur um tíðindini og lýsir hesi meira nágreiniliga. Vanliga eru hetta eisini sera áhugaverdar sendingar, sum Kringvarpið eigur rós uppiborið fyri.

Men í vikuni, sum fór, var eitt undantak í so máta, tá ið sendingin snúði seg um 10 ára minningarhald fyri kollsigldu fullveldissamráðingarnar.

### Politikarar mjølva sína køku

At politikararnir Annfinn Kallsberg og Høgni Hoydal mjølvaðu sína køku sum frægast við løgnum páhaldum, undraði ikki! Eitt nú, at orsøkin til, at vit ikki sluppu at atkvøða fyri ella ímóti loysing, var, at um uppskotið fall, var hetta at meta sum eina innliman í danska ríkið!! Álvaratos, hvussu kunna vit loysa frá einum ríki, sum vit ikki eru partur av og enntá hava hoyrt til í 600 ár?? Máti skal vera við, eisini hjá politikarum. Halda teir veruliga, at føroyingar eru so býttir?

Men fyri at fáa líkasum ein legalitet í royndina at grava fullveldislíkið uppaftur, hevði hesin mikrofonhaldarin av einum journalisti fingið søgufrøðing at gera sínar viðmerkingar. Ein søgufrøðing, sum ferð eftir ferð hevur víst, at hann setur politisku hugsjón sína hægri enn søguliga veruleikan og tillagar søguna hareftir.

### Politiserandi søgufrøðingur

Ein søgufrøðing, sum í rámasta álvara heldur uppá, at føroyingar hava vrakað grundlógina, tí valluttøkan var ov lítil við grundlógarbroytingina í 1920, tá Suðurjylland aftur bleiv ein partur av danska ríkinum!

Tí var ikki nógv sakligt væntandi frá hesum søgufrøðingi. Og hann legði eisini fyri við søgufalsan, tá hann segði, at ein lítil meiriluti av føroyingum atkvøddu fyri loysing í 1946, hóast hann væl veit, at tað ikki var ein lítil meiriluti av føroyingum, heldur ikki ein lítil meiriluti av teimum føroyingum, sum høvdu vælrætt, heldur ikki ein lítil meiriluti av teimum føroyingum, sum vóru á vali, men ein lítil meiriluti av teimum føroyingum, sum atkvøddu fyri báðum uppskotunum, um atkvøðurnar hjá teimum, sum ikki vildu loysing og atkvøddu nei, so sum loysingarmenn høvdu biðið teir gjørt og sostatt høvdu atkvøtt ógildugt og kanska ógildugt av øðrum orsøkum, verða gjørdar til onkis og ikki verða taldar við í valluttøkuprosentunum. Hetta er nakað heilt annað og ein ógvuliga konstrueraður lítil meiriluti!

### Hvar er fakligi stoltleikin?

Og eisini sigur hann, at tað viktigasta, sum fullveldislandsstýrið gjørdi, var at skera blokkin niður! Henda svikagerðin, sum vit merkja avleiðingarnar av hvønn dag.

Álvaratos! Hvar er fakligi journalistiski og søguligi stoltleikin?



**Jógvan Arge**
*Formaður í mentamálanevndini í Havn*

## Framtøk á Tórsvølli

Nú røkist fyri framstigum á Tórsvølli. Hampingin, sum øll hava ynskt, tykist at kunna fremjast í stigum komandi árini.

Hetta kann fyri ein góðan part gerast fyri pening, sum fæst til vega umvegis Fótbóltssamband Føroya frá UEFA og FIFA, og kommunan má sjálvsagt eisini leggja sítt í.

Fyrsta takið verður ætlandi at fáa ljós á Tórsvøll. Hetta verða ljós av bestu góðsku, sum tryggja, at umstøðurnar á Tórsvølli í so máta verða eins góðar og á øðrum framkomnum stadion til fótbólt.

Annað átak verður at fáa tak á áskoðaraplássini vestureftir, har húsið hjá FSF er. Hetta hevur leingi verið á okkara ynskilistum. Nú er hetta mestsum at meta sum eitt krav frá teimum, sum standa fyri altjóða fótbóltinum.

Í sama viðfangi verður grasið á Tórsvølli skift út við graslíki av bestu góðsku. Hetta er eisini eitt ynski, sum Tórshavnar kommuna og FSF eru samd um, nú graslíki er góðkent til altjóða kappingar.

Broytingin í undirlagnum fer at gera, at Tórsvøllur kann verða nógv meir í brúki í framtíðini. FSF fer at nýta hann til partar av sínum virksemi, og kommunan kann hava hann tøkan til havnarfeløgini í nógv fleiri tímar enn teir fáu, sum grasvøllurin kann verða tøkur í dag.

Alt í alt hugaligar ætlanir fyri Tórsvøll, sum í longri framtíð kunna fevna um neyðug átøk til tess at hampa um alt hansara look, so hann verður sama fragd fyri eygað sum fimleikahøllin fyri norðurendan.

Tað mugu verða rúmir møguleikar fyri fótbólti í høvuðsstaðnum, og tað skal verða hugnaligt og stuttligt at verða til bæði føroyskan og altjóða fótbólt á Tórsvølli.